# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Tróndur Eysturstein 75

Sunnudagin 16. juli vóru 75 ár síðani at Tróndur Eysturstein í Leirvík varð borin í heim úti í Hattarvík. Foreldrini vóru Axel Petersen úr Hattarvík og Maria fødd Andreasen úr Pállstovu á Eiði. Abbi Trónd Johan Petersen flutti sum ungur maður av Norðoyri út til Hattarvíkar, har hann giftist við Atu Zachariassen. Mamman flutti eisini sum ung út til Hattarvíkar. Hetta var gongdin tá í tíðini, fólk flutti til útoyggjarnar, tí har var hildið at vera liviligt. Men eftir kríggið broytist henda gongdin spakuliga, fólkatalið stendur í stað og byrjar so at minka. Axel og Maria flyta úr Hattarvík og inn til Norðdepil í 47 og tá verður øskukalt á Fløtti. Nú standa mong hús tóm í Fugloy, og í túnunum, sum fyrr ljómaðu við barnalátri og spæli, er kvirt ...



Tey vóru átta systkin, harav Tróndur er næstyngst, og hann er yngstur av 5 brøðrum. Tað má sigast at vera sjáldsamt fyri hesar 5 brøður, at teir hava hvør sítt eftirnavn. Jóhan er tann einasti sum ikki hevur fingið sær nýtt navn, so hann eitur framvegis Petersen, um enn flestøll munnu kenna hann betur sum Bella-Jóhan! Líggjas, sum búsettist í Klaksvík, fekk sær navn haðani og eitur Vágslíð, Mikkjal, sum fekk sær konu úr Svínoy, fekk sær navn haðani og eitur Miðalberg, Andrass var uppkallaður eftir abbanum á Eiði og fekk sær tískil tað navnið, sum abbin vanliga varð kallaður við – Andrass úr Pállstovu, og Tróndur vildi minnast heimstaðin við sínum navnið, Eystursteinur dagandi móti luftini uttast á Eystfelli. Systrarnar giftust og búsettust aðrastaðni við, Solveig í Svínoy, Malan í Hvannasundi og Signy í Vági.

Barnaárini í Hattarvík er ein tíð sum Tróndur minnist við gleði og takksemi, og tað er fragd í hjá okkum í dag at hoyra um lívið á útoyggj millum krígginí. Bjørgini vórðu røkt til lítar, hann sat sum 14 ára gamal einsamallur í Urðini og fleygaði heilar dagar, útróðrarbátur setti hann av á morgni og tók hann við aftur um kvøldið. Torvið varð alt skorið og flutt av Svínoynni, einasta samband við útheimin varð radiouppkall til Viðareiðis tvær ferðir um dagin ... ja, nógv er at siga frá og nógv er hjá nútíðin at undrast á, vit sum ganga við telefonini uppi á okkum og koyra úr oyggj í oyggj undir firðunum, meðan oljupallurin stingur borin fleiri kilometrar niður í havbotnin, leitandi eftir svarta gullinum, sum langt síðani hevur avloyst torvið av Svínoynni. Ríkur er arvurin, sum tey gomlu lótu eftir seg, um jørðiska góðsið í smáttuni á Fløtti var lítið. Frásagnirnar, orðafellini og skemtið liva enn. Styrkina, fimleikan og dirvi fekk hann frá fedrasíðini í Fugloy. Mamman av Eiði hevði góða sangrødd og musikaliteturin er eyðsýndur, hóast atgongd til skúling og ljóðføri var eingin.

Beiggjarnir hjá Tróndi fóru sum allir dreingir tá í tíðini tíðliga til skips, men teir høvdu so ringar royndir av hesum og vóru so góðir við lítlabeiggjan, at teir settu seg ímóti at hann fór tann vegin. So var at finna sær annað yrki, og 18 ára gamal gekk leiðin til Havnar at læra til timburmann hjá Lamhauge og Waagstein. Tá lærutíðin í Havn var av, hevði hann møtt lívsunnustini Elisabeth, dóttir Olgu og Dánjal á Longini í Leirvík, tey giftust í 1955, búðu fyrsta árið í Klaksvík og fluttu síðani til Leirvíkar. Tá varð fyrsti alvin Dánjal komin í verðina og síðani kom Axel í 1959, Maria í 1965 og sum rosinan (!) í pylsuendanum Olga í 1975. Húsabyggingin í Leirvík tók dik á seg í sekstiárunum og meginpartin av sínum arbeiðslívi hevur Tróndur bygt hús, og tey flestu av teimum í Leirvík. Av og á hava aðrar uppgávur verið á skránni, serliga tá gomlu arbeiðsgevarnir Lamhauge og Waagstein høvdu størri arbeiði í Eysturoynni.

Frítíðarítrivið hevur verið seyðurin. Tað byrjaði sum fjallmaður hjá Jákup Olaf Eysturi í Hjøllum, men uml. 1968 tørvaði Ólabónda ein nýggjan røktingarmann og tað gjørdist Tróndur. Hetta starv hevur hann røkt síðani, og hóast árini eru komin og ættarliðskifti langt síðani er farið fram í Innistovu, er enn pláss fyri honum í fjallskipanini hjá Ólabónda.

Tróndur kom sum ungur til trúgv á Hin Stóra Hirðan, og fylgi sum kom at vera hansara, var samkoman í Hebron. Har hevur hann havt sína trúføstu gongd øll árini og eisini verið ein aktivur partur, mong ár sum sunnudagsskúlalærari, forsangari í mong ár, tá eingin tónleikari var og altíð klárur við einum orði. Salurin, sum samkoman savnast í, og sum stóð liðugur í 1968, er eisini eitt av hansara bygningsverkum, hann bæði teknaði og stóð fyri byggingini. Mangur vitjandi hevur viðmerkt tað væleydnaða sniðið á salinum og hválvinum.

Sunnudagin hildu vit dagin saman við honum. Tey 10 abbabørnini vóru øll við uttan Bruno, sum er á listaskúla í París. Vit ynskja honum framhaldandi blíðan byr og Harrans signing í komandi tíðum.

**børnini**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Sigmund Bech,** Tvøroyri, andaðist á Suðuroyar sjúkarhúsi sunnudagin 16. juli, 77 ára gamal. Farið verður úr kapellinum til Tøroyrar kirkju týsdagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður mikudagin klokkan 13.00.
Tey, ið vilja minnast Sigmund, kunna lata eina peningagávu til Føroya felag móti krabbameini; konta í peningastovninum.

14 juli andaðist **Tollak Oskarson** Sandur 17 ára gamal. Sonur Nannu Tollaksdóttir og Oskar Henriksen.

14 juli andaðist **Jensia Petersen** ættað úr Froðba búðsitandi í Saltangará á Landsjúkrahúsinum 81 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum mánadagin klokkan 17 í Glyvra kirkju. Jarðarferðin verður týsdagin kl. 13. sálmabókin verður nýtt.

## Dagurin í morgin

**Arnolphus.** Deyður 641. Var biskuppur í Metz. Eftir deyða hansara hendu mong undurverk við grøv hansara, og hann varð skírdur halgimenni

# Tummas Jákup Thomsen í Ribarhús



Í døgunum 21. juli til 9. august sýnir Tummas Jákup Thomsen tekningar, vatnlitsmyndir, málningar o.a. í Gallarí Ribarhús í Fuglafirði. Til ferniseringina spælir Petur Pólson egin løg.

Opið er: mánadag-fríggjadag kl. 15-17, leygardag: kl. 11-13, og sunnudag kl. 15-17.

*Í døgunum 21. juli til 9. august hevur Tummas Jákup Thomsen framýning í Gallarí Ribarhús*

Føroya Fiskavirking:

# Fýra 25 ára starvsdagar í Vestmanna

Hósdagin 13. juli var hátíðarhald á Fiskavirking í Vestmanna í sambandi við at fýra av starvsfólkunum kundu halda sín 25 ára starvsdag á virkinum. Tey vóru: Jónolvur Andreassen, Elisa Ingebrigtsen, Bergfríð (Begga) Olsen og Elisabeth Hummeland.

Eisini varð hátíðarhildið at Sunnfríð Isaksen var liðug at læra og var útbúgvin sum fiskavirkari.

Øll fingu tey blómur og príðislutir sum tøkk fyri trúgva tænastu. Annars kann nevnast, at á virkinum eru tað onnur fólk, sum skjótt kunnu halda sín 30 ára starvsdag.



*Myndin er tikin undir hátíðarhaldinum seinasta hósdag. Aftara rað f.v.: Jónolvur Andreassen, Sunnfríð Isaksen og Jákup Eli Thomsen, virkisleiðari. Fremra rað f.v.: Elisa Ingebrigtsen, Bergfríð (Begga) Olsen og Elisabeth Hummeland*

*Mynd: D á Heygum*